# Skert KÍ lið skal steðga VB

*VB hevur tikið øll á bóli í ár, og liggja teir bert tvey stig frá oddaliðnum HB. Sunnudagin taka teir ímóti einum av fleiri liðum í kreppu, nevniliga KÍ*

HEINI Í SKORINI

Mest spennandi dysturin sunnudagin er uttan iva millum VB, sum bert liggur tvey stig frá oddaliðnum HB, og greipuvinnararnir frá í fjør, KÍ. Klaksvíkingar liggja á fimta plássi, og mong eru á einum máli um, at teirra møguleiki fyri at endurvinna FM heitið er ógvuliga lítil. Níggju stig eru upp til HB, og er tað kanska ein ov stórur biti hjá klaksvíkingum at gloypa.

**Týdningarmiklir leikarar uttanfyri**
Hjá VB eru eingir skaðar í hópinum, men tveir sera týdningarmiklir leikarar hava leikbann til dystin móti KÍ, og eru tað Tórður Holm og Milan Kuljic. Tórður Holm var hetjan seinasta vikuskiftið, tá hann skeyt bæði VB málini í 2-1 sigrinum á Sandi, meðan Milan Kuljic er ein sera týdningarmikil leikari á miðvøllinum hjá VB. Annars eru allir menn tøkir, og spennandi verður at síggja, um VB kann halda á í sínari sigursrøð.

**Broytingar á KÍ liðnum**
Tomislav Sivic verður noyddur at gera fleiri broytingar á KÍ liðnum, við tað at fleiri stuðulsleikarar ikki vera við. Millum teirra sum vóru í byrjunaruppstillingini móti HB, hevur Heðin á Lakjuni leikbann, meðan Jan Andreasen og Kristian á Lakjuni ikki hava vant hesa vikuna. Allan Joensen, sum kom inn í dystinum móti HB, er eisini smáskaddur, og hann verður neyvan við í Vági. Fríðin Ziskason og Símun Joensen, sum báðir leika í 2. deild, vera væntandi avloysarar, og harvið fara broytingar at vera á KÍ liðnum, sum skal royna at fóta sær eftir tapini í báðum teimum seinastu landskappingardystunum. Tapa teir sunnudagin, er FM møguleikin rokin fyri teirra viðkomandi, meðan VB kann koma upp á ovastu rók í 1. deild, um HB ikki vinnur á NSÍ.



*Leikandi VB venjarin hevur kanska størri týdning enn vanligt, nú tveir týðandi leikarar eru leikbannaðir til dystin móti KÍ*

# GÍ skal hava trý stig

*GÍ hevur verið eitt stórt vónbrot í ár men hava seinastu dystirnar víst, at teir eru við at koma fyri seg. Útlitini fyri trimum stigum sunnudagin eru góð*

HEINI Í SKORINI

GÍ tekur sunnudagin móti B71 í Gøtu, og eru líkindini til trý stig sera góð. GÍ vann fyrsta dystin eftir steðgin 5-2 á Sumba, og hóskvøldið vístu teir sera gott spæl á Tórsvølli móti Norrkøping í Europa Cup, hóast teir taptu 2-0. Gí er í løtuni á sjeynda plássi, men teir hava góðar møguleikar at vinna dystin sunnudagin og sostatt koma framum NSÍ á stigartalvuni.

**Helgi við aftur**
GÍ hevur flestu menn tøkar, men ivamál er um Rúna Justinussen, sum fekk ein snudd í dystinum móti Norrkøping. Annars er Helgi L. Petersen byrjaður at spæla aftur, eftir at hann hevur verið skaddur. Hann kom inn í dystinum á Tórsvølli hóskvøldið og spældi sera væl. Vónirnar eru góðar fyri trimum stigum, og ikki kann sigast annað enn, at GÍ er favorittur til at vinna dystin.

**B71 liðið nakað skert**
B71 fer til Gøtu uttan tríggjar týdningarmiklar leikarar. Waldemar Nowicki, sum er millum bestu málmenn í Føroyum, gjørdist skaddur móti VB, og er hann sjúkrameldaður í hvussu so er til mánadagin. Síðani eru Jógvan Jón Petersen og liðformaðurin Eli Hentze eisini uttanfyri við leikbanni, so tað verður eitt B71 lið ymsum broytingum sum fer inn á vøllin sunnudagin. Bæði liðini hava harðliga brúk fyri stigum, so vit kunnu vænta at síggja ein undirhaldandi og málríkan dyst í Gøtu sunnudagin, meðan trýstið heilt víst liggur á GÍ.



*Skulu gøtumenn longur upp á talvuni, er neyðugt við einum sigri móti B71*



*Eftir øllum at døma, fara toftamenn at verða omaná, tá Sumba hevur vitjað sunnudagin*

# B68 stórfavorittur móti Sumba

*B68 er stórfavorittur til dystin móti Sumba inni á Toftum sunnudagin, og við einum sigri kunnu teir veruliga hótta HB og VB*

HEINI Í SKORINI

Á Svangaskarði hittast B68 og Sumba sunnudagin, og er hetta ein sera týðandi dystur fyri bæði liðini. B68 er í løtuni fimm stig aftanfyri HB, og um teir ikki vinna sunnudagin, kann munurin gerast ov stórur upp til oddaliðini. Sumba hevur harafturímóti harðliga brúk fyri stigum, um teir skulu gera sær nakrar vónir um at vera verandi í 1. deild.

**Mortan og Marcelo ikki við**
Sumba hevur allar leikarar tøkar uttan Mortan úr Hørg, sum í løtuni er í Danmark. Hetta má avgjørt sigast at vera ein stórur smeitur fyri Sumba, av tí at Mortan er ein sera týdningarmikil leikari.

Hjá B68 hevur eingin leikbann, meðan brasilsiki áleyparin Marcelo er ivasamur til dystin. Hann gavst undir venjing hóskvøldið, av tí at hann føldi pínu í lærinum. Hann hevur síðani verið til viðger, men enn er ógreitt, hvussu verður við Marcelo.

Um B68 vinnur, og HB ikki megnar at fáa trý stig, eru toftamenn veruliga við í FM stríðnum, og hetta er als ikki ógjørligt. B68 er sum sagt stórfavorittar til dystin, meðan hini bæði oddaliðini HB og VB bæði hava truplar uppgávur sunnudagin.



# Støðan undan vikuskiftinum

## 1. deild, menn

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 11 | 8 | - | 2 | - | 1 | 23 | 11 | 12 | 26 |
| 2 | VB | 11 | 7 | - | 3 | - | 1 | 24 | 14 | 10 | 24 |
| 3 | B68 | 11 | 7 | - | 0 | - | 4 | 24 | 19 | 5 | 21 |
| 4 | B36 | 11 | 6 | - | 0 | - | 5 | 31 | 16 | 15 | 18 |
| 5 | KÍ | 11 | 5 | - | 2 | - | 4 | 27 | 11 | 16 | 17 |
| 6 | NSÍ | 11 | 4 | - | 3 | - | 4 | 23 | 19 | 4 | 15 |
| 7 | GÍ | 11 | 4 | - | 2 | - | 5 | 20 | 21 | -1 | 14 |
| 8 | B71 | 11 | 2 | - | 2 | - | 7 | 10 | 17 | -7 | 8 |
| 9 | FS Vágar | 11 | 2 | - | 2 | - | 7 | 13 | 28 | -15 | 8 |
| 10 | Sumba | 11 | 2 | - | 0 | - | 9 | 8 | 47 | -39 | 6 |

## 2. deild, menn

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | EB/Str. | 10 | 6 | - | 2 | - | 2 | 22 | 10 | 12 | 20 |
| 2 | TB | 10 | 6 | - | 2 | - | 2 | 28 | 21 | 7 | 20 |
| 3 | ÍF | 10 | 4 | - | 5 | - | 1 | 20 | 8 | 12 | 17 |
| 4 | B36 | 10 | 4 | - | 2 | - | 4 | 20 | 18 | 2 | 14 |
| 5 | NSÍ | 10 | 4 | - | 2 | - | 4 | 16 | 19 | -3 | 14 |
| 6 | HB | 10 | 4 | - | 1 | - | 5 | 25 | 31 | -6 | 13 |
| 7 | GÍ | 10 | 3 | - | 3 | - | 4 | 16 | 20 | -4 | 12 |
| 8 | LÍF | 10 | 3 | - | 2 | - | 5 | 13 | 14 | -1 | 11 |
| 9 | KÍ | 10 | 2 | - | 3 | - | 5 | 11 | 22 | -11 | 9 |
| 10 | Royn | 10 | 1 | - | 4 | - | 5 | 11 | 19 | -8 | 7 |

# FS-Vágar og B36

*Og ein totalt langt úti grein í Sosialinum*

Lat okkum enn eina ferð staðfesta, at málið viðvíkjandi Darius Magdisauskas ikki snýr seg um pengar, men um prinsipp – serliga við atliti til at eitt felag veit hvørjar spælarar tað hevur at ráða yvir í kappingarárinum.

**Gongdin í málinum**

1.
Darius Magdisauskas boðar okkum frá, at hann hevur gjørt avtalu við B36 og tí fer til Havnar at spæla.

2.
FS-Vágar biður Darius Magdisauskas heita á B36 um at seta seg í saband við okkum. Í hesum sambandi spyrja vit Darius Magdisauskas um hann framhaldandi vildi leika við FS-Vágar, um so var, at feløgini ikki semjast um skiftið. Hesum játtar Darius Magdisauskas.

3.
B36 setur seg í samband við FS-Vágar. Báðir partar eru frá byrjan samdir um at talan er um áhugaleikara. Ósemja stendst av at B36 sigur 10.000. FS-Vágar vil eisini hava endurgjald fyri serstakar útreiðslur.

4.
Fyri at fáa eina loysn á málinum heita vit á Fótbóltssamband Føroya (FSF) um at greina ivamál, mannagongdir og rættindi. Okkara áheitan á FSF er dagsett 03.07.2000.

5.
**06.**07.2000 boðar B36 okkum frá at: B36 rindar FS-Vágum ta upphædd, ið FSF áleggur okkum at gjalda í sambandi við skifti av leikarum.

6.
**25.**07.2000 kemur svarskriv frá FSF, sum sigur: at talan er um áhugaleikara og at talan tí er um 10.000 kr. umframt serstakar útreiðslur. Serstakar útreiðslur eru útgreinaðar, men ikki ítøkiligar. T.v.s. at vit eru ikki komnir eitt hakk víðari í málinum. Her skal viðmerkjast, at seinasta freist hjá útlendskum leikara at skifta felag er **28.**07.2000.

7.
Ótryggir við mannagongdina inntil nú heita vit á Advokatskrivstovuna um serkøna hjálp, niðurstøðan hjá teimum er, at leikarin kann ikki skifta felag uttan so, at feløgini eru samd. Hesum fráboða vit FSF **27**.07.2000. Sama dag fáa vit at vita frá Ísak Mikladal, aðalskrivara í FSF, at loyvisbrævið hjá Darius Magdisauskas er hjá FS-Vágar.

8.
Uml. **04.**08.2000 fáa vit frá **tíðindamanni í útvarpinum** at vita, at samb. Ísak Mikladal hevur B36 loyvisbrævið hjá Darius Magdisauskas. Vit kontakta FSF og fáa at vita at so er.

Umskyda meg, men hava vit nakra grund til at vera ónøgdir???

**Ein roynd at lýsa okkara ónøgd**
Á øllum fundum og uppskotum til áhugaleikarasáttmála og leikarasáttmála hevur ynski hjá øllum feløgum í landinum verið at eitt leikaraskifti fylgir eini so friðarligari mannagongd sum gjørligt. Tí hevur tað aftur og aftur veriðført fram at felag skal ikki gera avtalu við leikara fyrr enn viðurskiftini millum feløgini bæði eru avgreidd.

Grein 7 í reglugerð fyri áhugaleikarar sigur tí soleiðis:

*»Álagt verður felagi, sum ynskir leikara frá øðrum felagi, at seta seg í samband við avvarðandi felag, fyri at fáa viðurskiftini avgreidd«.*

Nú kann ein og hvør síggja, at sjálvt um øll feløgini vita hvat tað snýr seg um, so kann hendan greinin ikki brúkast til nakað sum helst, fyrst og fremst tí at eingin grein sigur, hvussu felag kann sektast, um tað kann prógv-ast, at onnur mannagongd er brúkt enn tann, ið grein 7 tilskilar. Hetta skerjir tó ikki okkara ónøgd.

Tað næsta, vit eru ónøgdir við, er at B36 og FSF frátaka okkum forhandlingsrættin. B36 yvirletur til FSF at áseta »prísin« og FSF liggur á málinum frá 03.07. til 25.07. B36 tykjast tryggir við støðuna, vit í villareið. FS-Vágar noktar tí sum avvarðandi felag at undirskriva umsókn um leikaraskifti. Hendan undirskrift krevst samb. Kappingarreglur fyri fótbólt Grein 16 stk. 2, sum sigur:

*»Útlendskur fótbóltsleikari kann bert fáa loyvisbræv til at leika í kappingini í 1., 2., 3. og 4. deild menn og 1. deild kvinnur fyri kappingarárið, um umsókn um hetta verður latin Kappingarnevndini í seinasta lagi 28. juli í kappingarárinum. Við umsóknini skal fyriliggja skrivlig váttan frá útlendska leikaranum og felagnum hann leikar við, um ætlaðu flytingina. Í hinum deildunum kann útlendskur leikari fáa loyvisbræv, tá hann er skrásettur sum fluttur til Føroya.*

FSF leggur seg á málið, krøkir okkum av, fyri síðan at skera ígjøgnum og tileinkisgera eina so greiða niðurstøðu sum omanfyri nevnda grein 16. stk. 2. er. Hvat í allari víðu verð er tað, sum fær FSF til, frá fyrstan tíð, at taka eina støðu sum sigur, at Darius Magdisauskas **SKAL** skifta til B36 óansæð hvat? Tað kundi jú verið kann skifta felag, um feløgini finna semju.

At vit fáa at vita støðu FSF‘s um tíðindamann í útvarpinum er sjálvsagt heilt burturvið. Vit kunnu leggja afturat, at enn hava vit einki skrivligt fingið at vita um at loyvisbrævið hjá Darius Magdisauskas er flutt til B36.

**Greinin í Sosialinum 08.08.2000**
Tá ein soleiðis kennir mannagongdina í málinum er greinin í Sosialinum týsdagin 08.08. skelkandi. Totalt langt úti.

Fyrstu lygnini kemur blaðmaðurin sjálvur við, citat: *»Tað, sum serliga var orsøk til ónøgdina, var at vágamenn søgdu B36 hava gingið aftur um bakið á sær,* ***meðan leikarin varð sáttmálabundin at FS-Vágar.***

Hetta kundi verið skrivað av óvart, enntá ein fyrigeviligur feilur, men tað ótrúliga er at restin av greinini byggir á hesa lygnina. Ein fullkomiliga nýggj versión av gongdini í málinum bryggjað saman av blaðmanni og Ísak Mikladal, aðalskrivara FSF‘s. Álvaratos hvønn hevur FSF havt samskifti við?

Sum sagt hava vit hildið okkum til kappingarreglurnar og reglugerð fyri áhugaleikarar. Rætt er at vit høvdu eina innanhýsis av-talu við leikaran, men er hendan ikki galdandi yvir fyri FSF, tá hon ikki er góðkend sambært Reglugerð fyri góðkenning av leikarasáttmálum grein 4. (og ikki í Kappingarreglunum, sum tað stendur í Sosialgreinini). Hesum vistu vit frá byrjan.

Sjálvt um tað er fyrstu ferð vit síggja málið í hesi versiónini, hevði tað verið áhugavert, um blaðmaður Sosialsins kundi sett Ísak Mikladal, FSF aðalskrivara, hendan fyrispurning: Eftir hvørjari grein kann FSF sekta FS-Vágar fyri ikki at hava sent leikarasáttmála til góðkenningar.

Og enn ein spurningur: Eftir hvørjari grein kundi FSF sekta B36, um brot á t.d. grein 7 í reglugerð fyri áhugaleikarar, – sjálvsagt um FSF nú valdi at venda kanónunum móti B36 ístaðin fyri ímóti FS-Vágar.

Spurningarnir eru áhugaverdir, tí undir málsviðgerðini hava vit veruliga saknað tílíkar sektargreinir.

Annars kunnu vit staðfesta, at hetta at vit ikki høvdu góðkendan yrkissáttmála hevur rakt okkum sjálvar, men her hevur leikarin so eisini eitt orð at siga, og hóast hetta málið hevur lært okkum, at einasti mátin at verða tryggur við leikarahópin er, at hava leikarasáttmála við allar leikarar, kann hetta verða trupult at útinna í verki.

**Vit gevast í hesum umfari**
Ná, alt fær ein enda, soleiðis skal eisini verða í hesum málinum. Tað sigur seg sjálvt, at vit verða ónøgdir við, at annað felag strýkur avstað við leikara, vit hava havt stríð og útreiðslur av at fáa til landið. Umframt kunnu vit vera ónøgdir við at FSF heldur okkum fyri tað turra spott.

Hinvegin vita vit, at feløgini annars ynskja skil á leikaraskiftum, og kann hetta mál verða ein hjálp til bata á komandi fundum. Tað verður okkara næsti og einasti leiklutur í hesum máli. UEFA skrædnar í kíki, um vit kæra FSF og teirra Wild West.

**Aftur til fótbóltin**
Komandi vikuskifti verður landskappingardystur í Sørvági ímillum FS-Vágar og B36. Vit fara at ynskja B36 vælkomnum vestur og fara at heita á leikarar og áskoðarar um at skapa ein **góðan** stemning um og á vøllinum.

Við ítróttarkvøðu,

**FS-Vágar**
**Jákup á Stongum, form.**

**Viðmerking**
Vísandi til omanfyristandandi skal eg vísa aftur, at eg skal hava skrivað ósatt, tá eg havi skrivað um ónøgdina hjá FS Vágum, sum siterað omanfyri.

Tað eg skrivaði í blaðnum 02.08 bygdi á samrøðu sum eg hevði við Páll Joensen, og sum eisini stóð skrivað í Sosialinum hin 27. juli.

Í sama blað varð eisini endurgivið tíðindaskriv frá FS Vágum hesum viðvíkjandi.

Annars hevur Jákup á Stongum rætt í, at tað er komið bland í orðingarnar »kappingarreglur« og »Reglugerð fyri góðkenning av leikarasáttmálum«, og skuldi henda misskiljing nú verið beind av vegnum.

*Somuleiðis við ítróttakvøðu*
**Jákup Mørk, blaðmaður**